## Uppgongd í toskastovninum

Svensku fiskiveiðimyndugleikarnir halda, at toskastovnurin í Norðsjónum er á veg uppeftir aftur – fyri fyrstu ferð í sjey ár. Hildið verður, at orsøkin til uppgongdina er avmarkaða toskaveiðan seinastu sjey árini. Hinvegin halda fiskiveiðimyndugleikarnir ikki, at positiv tekin í sama mun eru at síggja í Kattegat og í Eystursjónum

## Ætlan fyri Eystursjógvin

Tey tíggju londini, sum eru rundan um Eystursjógvin, eru samd um eina ætlan fyri hetta havumhvørvið. Fyri 2021 skal Eystursjógvurin aftur verða í einari økologiskari javnvág, sum tað verður rópt. Fyri at náa hesum máli, er neyðugt, at londini kring Eystursjógvin ansa betur eftir tí, sum fer í havið.



*Rógvi Mouritsen handar landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, eina bók. Í miðjuni stendur Niels Petersen, ritstjóri á Føroya Skúlabókagrunni*



*Tey skoða snotuligu bókina hjá Rógva Mouritsen, Fiskar undir Føroyum*



*Mamma Rógva, Gigga, sum er farin um tey níti, var eisini við til móttøkuna*



*Hann setti seg í trappuna at hyggja eftir vøkru myndunum, sum prýða bókina*

hava lisið handritið málsliga.

– Svenning er komin við sera viðkomandi ráðum og hevur gjølla sett seg inn í eitt fakøki og tilfar fyri síðan at veita málsliga ráðgeving.

Hon segði, at Svenning hevur gjørt eitt stórt og gott arbeiði fyri Føroya Skúlabókagrunn og fyri skúlaverkið.

– Teknararnir, Astrid Andreassen og Bente Olesen Nystrøm, smæast ikki burtur. Tekningarnar hjá Astrid hanga í gongini, og eg fari at heita á tykkum um at njóta hesa framsýning og tað nærlagni, sum er lagt í hvørja einastu mynd.

Hon legði aftrat, at Bente Olesen Nystrøm, sum hevur hjálpt til við at tekna, er kend sum framúr góður teknari í nógvum norðurlendskum fiskabókaútgávum seinastu árini.

– Rolf Mouritsen hevur gjørt skitsutekningarnar, og hann hevur víst síni evni.

At enda í síni takkarrøðu vendi Helena sær til Føroyaprent fyri dygdargott arbeiði.

#### Gott samstarv

Leiðarin á Føroya Skúlabókagrunni helt fyri, at Fiskar undir Føroyum er eitt fyridømi um gott samstarv millum stovnar og persónar.

– Bókin er eitt prógv um, hvat kann spyrjast burtur úr, tá ið vit draga somu línu og eru saman um stórar verkætlanir.

Helena Dam á Neystabø vendi sær síðan til rithøvundan:

– Heiðurspersónurin í dag er Rógvi. Bókin hjá tær er eitt megnarverk, sum tú eigur alla æru fyri. Vit hava í nøkur ár verið gjøgnum eina skapandi prosess saman – eina tilgongd, sum hevur verið bæði lærurík og gagnlig fyri endaliga úrslitið. Rógvi hevur verið arbeiðssamur og opin fyri tí nýggja, sum er komið inn í handritið.

At enda takkaði leiðarin á Føroya Skúlabókagrunni Rógva fyri sera gott samstarv.

– Eg vil ynskja tær hjartaliga tillukku við bókini, segði hon.